gult cyan magenta svart



## Klassisk konsert í Runavík og Tórshavn

Tað er Musica Viva ið skipar fyri, tá ið Sámal Petersen og Jóhannes Andreasen skulu á pallin í Runavík og Tórshavn komandi dagarnar.

Teir báðir fara at spæla verk á fiól og klaver. Á skránni verður »Svita í gomlum stíli« eftir russiska tónaskaldinum Alfred Schnittka, sonata í F-dur eftir Wolfgang Amadeus Mozart og »Kreutzersonatan« eftir Ludwig van Beethoven.

Konsertin í Runavík verður í Býráðssalinum hóskvøldið kl. 20.30, og konsertin í Havn verður í Listasavninum leygardagin kl. 16.00. Atgongumerki fáast við dyrnar.

## Gregoriussen framsýning í Keypmannahavn

*Birita Andreasen*

Framsýningin »Kirkjurnar í Føroyum« hjá J. P. Gregoriussen, verður nú at síggja í Keypmannahavn. Framsýningin hevur verið runt á oyggjunum her heima, og í Norðurlandahúsinum í Reykjavík. Nú er hon komin til Nordisk Ministerråd i Keypmannahavn.

Alt framsýningartilfarið er frá teimum 4 útgávunum um kirkjurnar í Føroyum, hjá J. P. Gregoriussen. Tað er í samband við 1000-ára haldið, at Nordisk Ministerråd skipar fyri framsýningini.

J. P. Gregoriussen hevur áður havt tríggjar framsýningar í Danmark. Hesar vóru í Gammel Dok í Keypmannahavn 1994, Klostergården í Horsens 1998 og Arkitektskolen í Århus 1998.

Framsýningin letur upp í gallarínum hjá Nordisk Ministerråd mikudagin tann 11. apríl 2001, og heldur áfram líka til 4. maj 2001.

## Yrkisdepilin givið út kunningarrit

*Birita Andreasen*

Yrkisdepilin hevur nú givið út eitt kunningarrit. Kunningarritið er fyrsta av sínum slag, og væntandi fer tað at koma út eina ferð um ársfjórðingin, í framtíðini.

Yrkisdepilin er ein sjálvstøðug fyrisitingareind í Vinnu- og Miðnámsskúladeildini undir Mentamálastýrinum. Depilin fyrisitur í høvuðsheitum arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál.

Yrkisdepilin metir kunning at vera sera týðningarmikið, og tí hevur depilin eisini eina heimasíðu. Nú er so tikið eitt stig aftrat á hesi leiðini, við at geva út eitt stutt rit. Ritið er fyrst og fremst ætlað læruplássum, yrkisskúlum, yrkisnevndum, viðkomandi feløgum og stovnum. Endamálið við ritinum er at kunna um ymiskt á yrkisútbúgvingarøkinum, umframt onkrar smágreinir, hugtøk og annað. Heimasíðan hjá Yrkisdeplinum er www.yrkisdepilin.fo

## Toran órógvar suðuroyingar

**Týsnáttina sló toran niður í Suðuroynni og órógvaði bæði telefonina, útvarpið og sjónvarpið**

SAMSKIFTI
Áki Bertholdsen

Fólkið hjá Føroya Tele í Suðuroynni hevur havt úr at gera seinastu dagarnar.

Týsnáttina gekk toran og tað endaði við, at hon sló niður.

Hetta órógvaði alt elektroniskt samskifti í Suðuroynni almikið. Telefonin riggaði ikki summastaðni, millumbylgjan hjá útvarpinum fór og sjónvarpssendarar fóru ymsastaðni, so nógvastaðni sóu suðuroyingar ikki sjónvarp allan týsdagin.
Síðani hevur fólk frá Føroya tele arbeitt við at fáa brekini í rættlag aftur. Arbeitt varð allan týs- og allan mikudagin og tað var óvist, um ikki okkurt kom at liggja eftir til í dag. Men so skuldi alt verið komið í rættlag aftur, sigur Føroya Tele

Tað, sum varð mest átrokandi, varð gjørt fyrst. Tvs, at telefonsamskiftið varð raðfest ovast, so var restin gjørt so hvørt.

# Misnýtsla av stuðli til heilivág




*Í seinastu viku hevði starvsfólkið á apotekinum í Havn úr at gera við at geva fólki læknafyriskipaðan heilivág. Av apotekinum verður sagt, at fólk leggja heilivág undir seg, tá ársfjórðingurin tekur at halla fyri at sleppa undan egingjaldinum*

**Fólk, ið fáa stuðul til keyp av heilivági frá almannastovuni, hava funnið ein møguleika at misnýta henda stuðulin. Pensiónistarnir rinda tær fyrstu 400 krónurnar av kostnaðinum í hvørjum ársfjórðingi, meðan Almannastovan rindar alt omanfyri. Snildin liggur í at keypa heilivág til fleiri ársfjórðingar í senn, og soleiðis kunnu pensiónistar spara 400 krónur hvønn ársfjórðing**

STUÐUL
*Stefan í Skorini*

Tjaldurs Apotek hevur altíð úr at gera, tá ársfjórðingurin er um at halla. Orsøkin er lógin um stuðul til heilivág, sum ikki leggur upp fyri, at fólk kunnu misnýta hana. Hetta úrslitar í, at fólk leggja heilivág undir seg við endan á hvørjum ársfjórðingi, so tey sleppa undan at gjalda sín part næsta ársfjórðing.

Hetta er ikki ólógligt, men stríðir hinvegin ímóti andanum í lógini, sum Kristian Magnussen kunngjørdi 24. november í 1997, tá hann var landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum. Kunngerðin kom í gildi tann 1. januar 1998.

Í lógini stendur at »stuðul kann einans veitast til útreiðslur omanfyri 400 krónur um ársfjórðingin«. Fólkapensiónistar og avlamispensiónistar kunnu søkja almannastovuna um stuðul til heilivág. Almannastovan veitir síðani umsøkjarum stuðul til heilivágin. Pensiónisturin hevur tó eitt egingjald, sum verður inntøkuregulerað.

– Vit merkja tað týðiliga á arbeiðsbyrðini, tá ársfjórðingurin tekur at halla. Fólk koma inn at fylla goymslurnar. Fólk kunnu bunkra heilivág til eitt hálvt ár og soleiðis leypa tveir ársfjórðingar um, sigur Petur Oluf Joensen, apotekari í Havn.

Tá fólk leggja undir seg til hálvt ára nýtslu, sleppa tey undan at keypa heilivág í tveir ársfjórðingar. Soleiðis sleppa tey eisini undan at gjalda tær 400 krónurnar, sum tey av røttum eiga at gjalda hvønn ársfjórðing.

Hesa snildi hava fólk, ið hava tørv á nógvum heilivági, fyri langari tíð síðani funnið útav at nýta til egnan fyrimun.

### Kunnu spara nógv

Eitt grefligt dømi er pensiónistur, ið hevur eina nýtslu, sum liggur í fastari legu. Hann kann tí rokna út, hvussu nógv hann skal hava tað næsta árið. Tí verður allur heilivágurin keyptur í einum ársfjórðingi, so hann bara skal rinda tær fyrst 400 krónurnar. Soleiðis hevur hann spart 1200 krónur ígjøgnum árið. Hjá einum pensiónisti, sum bara fær vanliga eftirløn, er hetta nógvur peningur at spara.

Í seinastu viku hevði starvsfólkið á apotekinum úr at gera við at veita viðskiftafólki læknafyriskipaðan heilivág, tí tá endaði undanfarni ársfjórðingur og fleiri komu at leggja undir seg til nýtsluna teir næstu mánaðirnar.

### Læknarnir skulu stýra

Ein av fortreytunum fyri, at henda snildin letur seg gera, er, at læknarnir útskriva reseptir, sum gevur sjúklinginum møguleika fyri at keypa nóg nógvan heilivág. Um læknin útskrivar eina resept, sum bara gevur pensiónistinum møguleika at keypa heilivág til stutta tíð, hevði ikki borið til at nýtt hatta holið í lógini.

– Eg haldi, at tað er lagt upp til, at læknarnir stýra soleiðis, at teir ikki geva fólki møguleikan at leggja undir seg til fleiri ársfjórðingar. Tað er uppgávan hjá læknunum at forða fyri misnýtslu av skipanini, sigur Petur Oluf Joensen.

gult cyan magenta svart



# Fingu yvir 50 umsóknir

**Tað er stórur áhugi fyri at sleppa á nýggja almanna- og heilsuskúlan í Suðuroy**

ÚTBÚGVING
*Áki Bertholdsen*

Tað er rættiliga stórur áhugi fyri at sleppa inn á nýggja Almanna- og heilsuskúlan, sum nú er settur á stovn í Suðuroynni.

Tá ið umsóknarfreistin var úti, høvdu yvir 50 næmingar søkt um at sleppa inn á skúlan.

Men tað er ikki pláss fyri meiri enn 20 næmingum á skúlanum, so hjá meiri enn øðrumhvørjum umsøkjara var tað til fánýtis - í hvussu so er hesuferð.

Umsøkjarar eru úr øllum landinum. Umleið helvtin av umsøkjarunum eru úr Suðuroy og umleið helvtin er aðrastaðni úr landinum.

Onkrir av umsøkjarunum hava børn, men tað er ongin trupulleiki at fáa tey ansað á Tvøroyri.

Skúlin byrjar fyrst í september.

Útbúgvingin, sum byrjar tá, er tann, ið nevnist almanna- og heilsuhjálpari.

Hendan útbúgvingin varar í eitt ár, men meiri enn helvtin av tíðini er starvsvenjing. Næmingarnir eru fyrst í skúla í átta vikur, so eru teir í starvsvenjing í 16 vikur. Eftir tað eru teir aftur á skúlabonki í sjey vikur og so eru teir aftur í starvsvenjing í 20 vikur. At enda er aftur ein vika í skúla, tá ið næmingarnir eru til roynd.

Annars byrjar skeiðið fyri heimahjálparar nú í vár. Tað er eitt skeið uppá 26 vikur fyri heimahjálparar, ið hava arbeitt í nøkur ár. Hetta skeiðið byrjar við 10 vikum í skúla, síðani eru 14 vikur í starvsvenjing so aftur tvær vikur í skúla. Fyri at kunna koma á á hetta skeiðið, skal ein heimahjálp hava arbeitt minst 24 tímar um vikuna í minst trý ár av teimum seinastu fimm árunum!

Men til tað skeiðið skulu umsóknir ikki sendast skúlanum, tí tað er heimarøktin sjálv sum skipar fyri at senda heimahjálpir á skeið.



*– Nýggi almanna- og heilsuskúli, sum nú byrjar á Tvøroyri skal halda til í hesum húsinum mitt á Tvøroyri, hann hevur fingið góða undirtøku, men meiri enn helvtin av umsøkjarunum verða við sviðusoð*

### Um nøkur ár

Annars skal ein útbúgving afturat verða á skúlanum, tað er útbúgvingin til almanna- og heilsurøktara, sum er ein útbygging av útbúgvingini til almanna- og heilsuhjálpara.

Aftaná útbúgvingina til almanna- og heilsuhjálpara, tekur tað hálvtannað ár at blíva almanna- og heilsurøktari.

Men tað skilst, at farið verður ikki undir útbúgvingina til almanna- og heilsurøktara, fyrrenn um nøkur ár. Orsøkin til tað er, at tað er ikki pláss fyri teirri útbúgvingini eisini í skúlahølunum, sum eru. Í skúlanum, sum er, er bara ein skúlastova og tað skal nýggjur skúli til, áðrenn farast kann undir tað stóru útbúgvingina, verður sagt av almanna- og heilsuskúlanum.

Fyrr er upplýst, at skúlin, sum nú er, er bara ein fyribils loysn og at ætlanin er at útvega onnur og betri hóskandi høli um eini tvey, trý ár.

# Ikki samdir um treytirnar enn

**Undirvísingar- og mentamálastýrið ikki samd um leiguna fyri skúlahúsið, sum Almanna- og heilsuskúlin skal halda til í. Og um ein mánað byrjar skúlin**

TVÍDRÁTTUR
*Áki Bertholdsen*

Enn er ógreitt, hvussu verður við hølunum til nýggja almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri. Eftir ætlan skal skúlin byrja longu um ein mánaða. Tvøroyrar Kommuna hevur útvegað hús til skúlan og hevur hartil gjørt tey at kalla púra av nýggjum innan.

Ætlanin varð so, at Undirvísingar- og mentamálastýrið skuldi leiga húsið frá kommununi til at hava skúla í.

Men í hesum sambandi hevur ein trupulleiki stungið seg upp. Og tað er, at Tvøroyar Kommuna og Undirvísingar- og mentamálastýrið, eru ikki enn blivin samd um leiguna, sum kommunan skal hava fyri húsið.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at partarnir hava samráðst um málið, men enn er langt ímillum.

– Vit eru heilt langt frá eini semju. sigur hann.

Men hann væntar, at tað fer at eydnast at finna semju.

Um tað ikki skuldi eydnast, veit hann ikki, hvat hendir.

– So stendur kommunan við einum nýumvældum húsum. Men, hvat vit skulu brúka tey til, vita vit ikki.



*– Tað sigst at nógv hús standa tóm á Tvøroyri. Men ivasamt er, hvussu eigararnir eru sinnaðir at leiga. Enn hava átta av næmingunum á almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri, ikki fingið innivist*

### Flestu fingið innivist

Annars hevur tað heldur ikki enn eydnast at fáa øllum næmingunum, sum skulu ganga á skúlanum, innivist.

Tvøroyrar Býráð hevur lýst í bløðunum, at tey, sum hava býli til leigu, kunnu venda sær til kommuna, sum so beinir málið víðari.

– Tað verður ikki kommununan, sum leigar bústaðir til næmingarnar. Tað gera næmingarnir sjálvir. Men vit hava átikið okkum at verða millumlið ímillum tey, sum hava bústað at leiga og skúlan, sigur Finnleif Guttesen.

Hann sigur, at av teimum 20 næmingunum, sum skulu ganga á skúlanum, hava 12 fingið innivist.

– Enn eru tað sostatt átta næmingar, sum ikki enn hava fingið innivist. Men tí málinum arbeiðir kommunan nú við.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at sóknast verður aftur nú í bløðunum eftir bústaði til næmingarnar.

Hann heldur, at tað átti ikki at verið nakar trupulleiki at fingið bústað til næmingarnar, tí nógv hús standa tóm.

Annars eru tað í hinari greinini í blaðnum í dag um skúlan, víst á, at onkrir av umsøkjarunum hava børn. Men tað verður ongin trupulleiki at fáa børnini ansað.

– Vit hava samtykt í býráðnum, at barnaansing skal ikki verða nøkur forðing hjá áhugaðum næmingum at søkja á skúlan. Vit hava nevniliga samtykt at tryggja teimum næmingum barnaansing, sum hava brúk fyri tí, sigur Finnleif Guttesen.